# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Palli á Dul 60 ár

Hósdagin 13. mars fylti Palli á Dul á Argjum 60 ár.

Palli er best kendur frá sínum starvi sum el-innleggjari og sum íðin B36 viðhaldsmaður.

Føðingardagurin varð eisini hildin í B36-húsinum seinasta leygarkvøld.

Palli er føddur og uppvaksin í Havn, sonur Astrid, f. Thomsen, ættað úr Porkeri, og Jákup á Dul úr Havn, sum doyði í 1960, 45 ára gamal.



Starvsleiðin hjá Palla varð løgd, tá hann sum ungur fór í læru sum elektrikari hjá P/F Leif Mohr. Eftir at hava arbeitt sum elektrikari í nøkur ár læt í hann upp elhandilin Elektra í Dr. Jacobsensgøtu við el-hvítvørum og el-húsarhaldstólum. Handilin hevði hann frá 1974 til 1980. Síðan fór hann aftur í starv sum elektrikari hjá P/F Leif Mohr, til hann í 1982 fór til Danmarkar at taka prógv sum el-installatørur.

Heimafturkomin stovnaði hann sína egnu elektrikarafyritøku, sum hann hevur rikið til 1. august 2007, tá hann tók við sum faklærari á el-deildini á Tekniska Skúla í Havn, og sonurin, Petur, yvirtók elektrikarafyritøkuna.

Fótbóltsáhugin er helst komin av at pápabeiggin, Grímur á Dul, sum búði í grannalagnum, bjóðaði dreingjunum sum búðu har áleið (við Dr. Jacobsensgøtu, Grím Kambansgøtu og Bøgøtu, vanliga nevndir Bø-fressar) við sær í bilinum niðan í Gundadal til fótbóltsdystir. Grímur var kendur sum ein íðin B36-ari. Umframt at Palli gongur upp í B36 við lív og sál, dámar honum eisini væl at vera á floti.

Palli er giftur við Mariu, f. Gregersen av Argjum. Tey eiga børnini børn: Petur (35 ár) býr í Kirkjubø, Marianna (30 ár) býr í Havn, og Jákup (28 ár) sum býr á Signabø. Abbabørnini eru fýra í tali.

## Andlát og jarðarferðir

**Zacharias Stórá í Skopun** andaðist á Áargarði fríggjadagin, 98 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Skopunar kirkju týsdagin kl.14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Zacharias, kunnu lata eina gávu til Skopunar kirkju.

Jarðarferðin hjá **Mariu Krabbenhøft**, verður týsdagin klokkan 13 úr Vestmanna kirkju. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið ynskja at minnast Mariu, kunnu lata kirkjuni eina peningagávu.

Kistan við **Jógvan Hjaltason Joensen í Klaksvík** fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mánakvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður Christianskirkjuni týsdagin klokkan 13.30.




## Minningarorð um okkara góða vin

# Poul Jóhannes í Horni

Tað er tungt at koma heim og ikki síggja teg á hjørninum, sum vit plagdu at siga - og tú gekk niðan at fáa tær ein kaffimunn. Eg kom at kenna teg tá tú og Hallgerð livdu saman, og eg og Jannie komu inn til tykkum við okkara fýra smágentum. Altíð glaður og góður við tær. Men Hallgerð fór tíverri á ungum árum. Tú hevur verið trúfastur og vitja okkum. Børnini kallaðu teg fyri Víkaabbi.

Góði Poul Jóhannes, síðst eg tosaði við teg á sjúkrahúsinum, løgdu vit planir um at fara til Spania í summar at vitja Meinhardt og Viviann, men so skuldi ikki vera. Tveir dagar aftaná at eg kom niður aftur, fekk eg deyðsboðini av tær. Tað kennist hart at eg ongantíð skal síggja teg aftur. Eg veit at tú hevur tað gott har tú ert nú.

Eg takki tykkum, Meinhardt, Vimu og Maibritt fyri, at tit hava verið so góð við gubba. Saknurin er stórur, eisini hjá tykkum Øgga, Niels og Mary, við størstu virðing og sakni, hvíl í friði.

**Bryngerð**

---

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at okkara kæri

**Óla-Svenn Nolsøe**

doyði 15. mars á Landssjúkrahúsinum, 56 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
mikudagin 19. mars kl. 13.

*Familjunnar vegna*
**Eyðbjørg**
**Johanna, Sonja og Katrin**

Tey, ið ynskja at minnast Óla-Svenn kunnu lata eina peningagávu
til menning og eftirútbúgving av fjskúlalærarum.
Konta í peningastovnunum

---

**Pauli Næs**
maskinsmiður
ættaður úr Nesi, Hvalba
búsitandi í Havn

andaðist sunnumorgunin 16. mars
á Landssjúkrahúsinum, 83 ára gamal.
Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum
mikudagin kl. 16.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
hósdagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Lisa og børnini**

---

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at
góði pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Hjalmar Heerup Danielsen**
Skála

andaðist fríggjadagin 14. mars á Landssjúkrahúsinum.
Farið verður úr kapellinum mánadagin 17. mars
kl. 18 í Skála kirkju.
Jarðarferðin verður týsdagin 18. mars kl. 14.

*Vegna tey avvarðandi*
**Andrass, Pállfríða, Jóhanna og Pætur**

Tey, ið ynskja at minnast Hjalmar, kunnu lata Skála kirkju
eina gávu